## Lógarrit heimasíðu

Føroyskt Lógarrit, vanliga stytt FLR, hevur fingið nýggja heimasíðu, har fólk kunnu fáa upplýsingar um virksemið hjá Føroyskum Lógarriti. FLR er eitt løgfrøðiligt/stjórnmálafrøðiligt tíðarrit, og FLR skipar fyri at geva út tilfar, sum lýsir og greinar mál av týdningi fyri føroyska løgdømið. Bæði føroyskir og útlendskir frøðingar skriva í tíðarritið. Á nýggju heimasíðuni, sum eitur www.flr.fo kunnu fólk tekna seg sum haldara.

## Havtaska ferðast

Tey flestu, sum hava sæð ein náttúrufilm av havsins botni, munnu uppfata havtaskuna sum ein fisk, ið liggur í sandinum á botni og gloypir tí, sum fyri kjaftin rekur. Men kanningar hjá íslendsku fiskirannsóknarstovuni vísa, at havtaskan men kann ferðast langan veg. Í einum føri varð ein merkt havtaska fingin aftur heilar 343 fjórðingar frá tí staðnum, har hon var vorðin merkt. Hon hevði tá ferðast hálvan fjórða fjórðing um dagin.



*Bryan Rice hevur eina framúr góða rødd, og hann syngur bæði læattan popptónleik og vakrar balladur*

# Donsk poppstjørna á Planet Awards

**Bryan Rice, sum í fjør fekk rættiligt gjøgnumbrot í Danmark, verður við til Planet Awards, har hann fer at hava eina framførslu við sínum kendu poppsangum**

Ein av best umtóktu poppsangarunum í Danmark kemur til Føroya í sambandi við Planet Awards. Føroyska virðislønartiltakið verður hildið á Hotel Føroyum tann 27. januar, og millum tey, sum skulu á pallin at framføra, verður ein danskur poppsangari.

Tað er Bryan Rice, sum hevði eitt risahitt við sanginum No Promises í fjør. Hann fekk rættiligt gjøgnumbrot í Danmark, og útgávan Confessional stóð seg so væl, at Bryan Rice er í uppskoti til eina Zulu virðisløn sum besti sangari í 2006.

### Rice hevur alt

Bryan Rice hevur eina framúr góða rødd, og hann setir rættiligan dám á sín popptónleik við sterku røddini hjá sær. Hann fær fólk bæði at smílast og tára, tá ið hann syngur antin læattar poppsangir ella vakrar balladur.

Sagt verður, at Bryan Rice onkursvegna líkist sangarum sum John Legend, Gavin DeGraw og James Blunt, men tað er tó okkurt serstakt við danska sangaranum.

Sangurin No Promises bleiv gjørdur til filmin Nynnes Dagbog, og hann gjørdist stóra gjøgnumbrotið hjá Rice.

– Eg gjørdi sáttmála við Bryan Rice uttan at hava hitt hann. Eg kendi hann ikki, men eg hoyrdi hann syngja, og eg helt, at hann hevði so framúr góða rødd, at eg kundi ikki standa ímóti honum. Hann hevur altjóða format – bæði við røddini og síni útstráling, sigur Remee, sum í 2005 gjørdi sountrackið til Nynnes Dagbog.

Og tað er okkurt, sum bendir á, at Remee hevur rætt, tí tað hevur gingið strúkandi hjá Bryan Rice, síðani fløgan hjá honum kom út í Danmark í fjørvár, og nú er hann í uppskoti til eina Zulu virðisløn.

### Røddin var til meira enn kór

Áðrenn gjøgnumbrotið sum solistur, var Brian Risbjerg Clausen, sum hansara kristnað navn er, virkin í donskum tónleiki. Hann syngur millum annað kór á sanginum From Paris To Berlin hjá Infernal, og hann leggur eisini rødd til Jukebox hjá Bent Fabricius-Bjerre.

Men flott røddin hjá Bryan Rice var til meira enn bert kórsang, og seinasta árið hevur hann rættiliga roynt flogið sum solistur.

Nú kemur hann so til Føroya á fyrsta sinni, og hann fer at hava eina framførslu til Planet Awards.

Atgongumerki til stórfingna tiltakið Planet Awards fáast til keyps í Telebúðunum í Havn, Klaksvík og Runavík. Tey kunnu eisini keypast umvegis teleshop.fo og í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Avmarkað nøgd av atgongumerkjum verða seld.